# Heiðurskonsert H. J. Højgaards

HEIÐURSKONSERT
*Tíðindaskriv*

Í sambandi við, at tað 11. september í ár verða liðin 100 ár, síðan tónlistamaðurin Hans Jákup Højgaard var borin í heim, verður heiðurskonsert í Norðurlandahúsinum sunnudagin 10. oktober, kl, 16.00

Við á konsertini verða Havnarkórið, og eisini spælir Symfoniorkestri suituna, ið var gjørd til 80 ára føðingardagin hjá HJ Højgaard.

H. J. Højgaard var ikki einans toftamaður, hann var eisini fremsti kórmaður alla føroyinga, og hann virkaði eisini stóran part av lívi sínum sum lærari og kórleiðari í Havn.

Skrá fyri konsertina:
*Sí sólin fríð*
*Steingrim Niclasen*
*O, faðir góði*
*Mikkjal á Ryggi*
*Eg skar mítt navn*
*Jóannes Patursson*
*Nú tann stundin koma má*
*Hans A. Djurhuus*
*Í Sundalagnum ein sólskinsdag*
*Rikard Long*
*Summarmáli*
*Georg L. Samuelsen*
*Einki er sum summarkvøld við strendur*
*Heystkvøld*
*Jeffrei Henriksen*
*Lítlan*
*Tummas N. Djurhuus*
*Heyst*
*Tummas N. Djurhuus*
*Studentaskúlakantatan*
*Karsten Hoydal*

Steðgur
*Berghild Poulsen, solo*
*Tíðin rennur*
*Fríðrikur Petersen*
*Dagurin aftnar*
*Hans Michael Jacobsen*

Kvinnukór
*Nú sprettur á fold*
*Andreas Andreasen*
*Nú suðar stilt*
*Mikkjal á Ryggi*
*Góða mamma, kom*
*Marius Johannesen*
*Hon stóð har við rokkin og spann*
*Hans A. Djurhuus*
*Teir sigla so væl sín fríða knørr*
*Hans A. Djurhuus*
*Í Noreg búðu raskir menn*
*Símin M. Zachariassan*
*Føroya Symfoniorkestur*
*Højgaard-svitan*

Havnarkórið og Kirkjukórið á Toftum
*Tórshavn*
*Poul F. Joensen*
*Tá ið teir sóu landið*
*Hans A. Djurhuus*
*Fedranna tala*
*Heðin Brú*
*Felagskórið og orkestrið*
*Eg oyggjar veit*
*Fríðrikur Petersen*

# Sinnisdagur í Føroyum

**Í dag, 9. oktober**

SINNISDAGUR
*Tíðindaskriv*

Í samband við at alheims heilsustovnur ST (WHO) hevur kosið 10 Oktober til altjóða sálarheilsudag, setur Sinnisbati fokus á støðu teirra sálarsjúku við at skipa fyri tiltøkum henda dagin, undir heitinum: Gevið sinninum gætur!

Endamálið er:

at skapa meiri tolsemi og betri fatan av teimun sinnislíðandi og teirra kæru

at fáa føroyingar at stuðla arbeiði fyri tey sinnislíðandi

at skapa teim betri bústaðar-, ítrivs- og verkamøguleikar

at fyribyrgja sálarsjúkum og betri møguleikum at gerast frísk aftur

Alheims heilsustovnur Sameindu Tjóða sendir hvørt ár út eitt uppskot um hvørji evni, íð tey einstøku Sinnisbata-feløgini kring heimin eiga at taka fram á hvørjum ári. Ì 2004 er evnið: eitt sunt sinni í sunnum kroppi

Vit í sinnisbata hava valt at leggja dent á hettar evnið og á støðu teirra sálarsjúku í Føroyum, sum heild. Øll kunnu verða rakt av sálarveikleikum og sálarsjúku, summi tíðliga og onnur seinni í lívinum. Tí eiga vit øll, bægi ung og fólk í bestu árum, at hava hugtakið eitt sunt sinni í sunnum kroppi frammalaga í huga hvønn dag.

Í samband við alheims sálarheilsudagin 9. Oktober verður Sinnisbati á Vaglinum kl. 12:30. Vit tosa um framtíð og politiskar visiónir í psykiatriini.

– Sinnisbati hevur áhuga fyri tiltakinum hjá kunningarstovuni, KOM og GAKK. Í samband við evnið: eitt sunt sinni í sunnum kroppi verður heitt á fólk um at taka lut í gongutúrunum, tí tað stimbrar kropp og sál, sigur Soffi Egholm, forkvinna fyri Sinnisbata.



NISSAN SERENA 1.6 i
· Vøruvognur
· Bensin
· Árg. 12-94
· Km. 151.000
kr. 65.000,- v/mvg
TELEFON 21 80 68

Felags vilji, felags mál

Landsliðið er fyri allar føroyingar.
Tað er Føroya Banki eisini.
FØROYA BANKI
HØVUÐSSTUÐUL HJÁ FØROYSKA LANDSLIÐNUM


Eyka tyrluflúgving í heystfrítíðini

Í heystfrítíðini verður eyka flúgving við tyrluni.
**Mánadagin 11. oktober** og **leygardagin 16. oktober** verður flogið sum fríggjadag. Talan er um eina roynd fyri at vita, um undirtøka er fyri slíkari eykaflúgving.

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel 34 10 60 · Faks 34 10 01 · tyrlan@atlantic.fo
www.atlantic.fo




# Rumbul í Fólkaflokkinum í Klaksvík

**Jógvan Lützen noktar at vera á sama lista til býráðsvalið, sum Jákup Mikkelsen og sostatt hevur hann tikið seg aftur sum valevni fyri fólkaflokkin í Klaksvík**




*Eftir gøluna um Jógvan S, kann Jógvan Lützen als ikki samstarva við Jákup Mikkelsen og tí hevur hann tikið seg av fólkaflokslistanum til býráðsvalið í Klaksvík*

BÝRÁÐSVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Málið um tiltikna línubátin, Jógvan S. úr Klaksvík, hevur nú fingið eitt óvæntað eftirspæl.

Tað kom fram, nú fólkaflokkurin í Klaksvík skuldi manna listan til býráðsvalið í næsta mánaði.

Tá ið fólkaflokkurin skuldi gera listan lidnan, nú í vikuni, kom rumbul í.

Ætlanin var, at Jógvan Lützen, gamli reiðarin á Jógvani S., skuldi verða valevni, sum hann hevur verið fleiri ferðir fyrr.

Men tá ið so Jákup Mikkelsen eisini kom á listan, kom rumbul í, siga keldur í Klaksvík, sum standa fólkaflokkinum nær.

Tá ið tað varð greitt, at Jákup Mikkelsen eisini skuldi verða valevni til býráðsvalið, gjørdi Jógvan Lützen bart og tók seg av listanum.

Hann kunngjørdi, at hann kundi ikki vera á sama lista, sum Jákup Mikkelsen er á og hann tók seg sostatt av listanum.

## Jógvan S. spøkir aftur

Orsøkin til hesa avgjørdu støðuna hjá Jógvan Lützen, skal finnast í gøluni um línubátin, Jógvan S.

Jógvan Lützen kann ikki gloyma Jákup Mikkelsen tann leiklut, sum hann hevði í málinum, sum førdi til, at Jógvan S. varð lagdur og seinni fór av knóranum.

Jákup Mikkelsen var limur í Landsstýrismálanevndini, sum viðgjørdi málið um Jógvan S.

Niðurstøðan hjá landsstýrismálanevndini førdi við sær, at Jógvan S. varð lagdur. Sostatt metir Jógvan Lützen, at Jákup Mikkelsen var ein høvuðsmaður aftanfyri at leggja Jógvan S.

Seinni fór báturin á húsagang, manningin varð søgd upp og íleggjararnir mistu sín pening.

Seinni hevur Føroya Rættur felt dóm í málinum og dómurin var, at tað var ólógligt at taka fiskiloyvið frá Jógvan S.

Alt hetta málið hevur tikið Jógvani Lützen so fast, hann rætt og slætt ikki vil vera valevni á sama lista, sum Jákup Mikkelsen er á.

Jógvan Lützen boðaði frá, at hann kundi als ikki samstarva við Jákup Mikkelsen eftir tað viðferð, hann hevði fingið frá honum í málinum um Jógvan S.

## Fekk 100 atkvøður

Tað er onki at ivast í, at Jógvan Lützen verður ein missur hjá fólkaflokkinum til býráðsvalið í Klaksvík, tí hann plagar at fáa fitt av atkvøðum og á seinasta býráðsvali fekk hann 100 atkvøður.

Hann er býráðslimur í løtuni. Hann hevur tikið sætið í býráðnum eftir at Jógvan við Keldu fór í Landsstýrið. Annars hevur Jógvan Lützen verið uppstillaður til býráðið tríggjar ferðir áður og hann hevur verið beinleiðis valdur tvær ferðir.

Vit hava roynt at fingið eina viðmerking frá Jógvan Lützen, men hann er ógvuliga fáorðaður.

Kortini váttar hann, at hann eftir ætlan skuldi stilla upp fyri fólkaflokkin til býráðsvali, men at váttar eisini, at hann er ikki á listanum. Og fleiri viðmerkingar hevur hann ikki.


Framsýning í Müllers pakkhúsi




Havnin frá ár 1000 til 1816

Áhugaverd framsýning við myndum, kortum, skjølum og tekningum úr bókunum um Havnar søgu.

Opið er hvønn dag frá kl. 14 til kl. 18 fram til 24. oktober.

Ókeypis atgongd.

Tórshavnar kommuna
Mentamáladeildin

Stovnið breiðband fyri

0,- kr.*)

Prísir úr 280,- kr./mðr.

Stovnar tú I-net Privat Breiðband frá Føroya Tele, geva vit tær stovningina púra ókeypis - tú sparir 750,- kr.

| Nýtslutørvur | Nýtslumynstur | Prísur/mðr. | Ferð | Nýtslugjøld |
|---|---|---|---|---|
| Lágur | Surf, postur, chat og spæl | **Kr. 280,-** | 256k/128 | 50 oyru/Mbyte. kl. 08-18<br>40 oyru/Mbyte. kl. 18-08<br>Nýtt Príslækking! |
| Miðal til stórur | Surf, postur, chat, spæl og tónleikur | **Kr. 595,-** | 512k/128 | **ÓKEYPIS upp til 2 Gbyte**<br>50 oyru/Mbyte. kl. 08-18<br>40 oyru/Mbyte. kl. 18-08<br>Nýtt Príslækking! |
| Stórur | Surf, postur, chat, spæl, tónleikur og filmur | **Kr. 895,-** | 1024k/128 | **ÓKEYPIS upp til 3 Gbyte**<br>50 oyru/Mbyte. kl. 08-18<br>40 oyru/Mbyte. kl. 18-24<br>ÓKEYPIS kl. 24-08<br>Nýtt Príslækking! |

Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...

I-net BREIÐBAND

**) Treytað av at tú teknar I·net privat breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 1. novembur 2004. Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.*

FØROYA TELE